# STÓRT TILTAK

## Í Argja skúla

Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00

Mattombola
Bommtombola
Café
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
Skreiðirør
Fiskibrunnur
Hoppiborg
Ponyríðing
Sodavatnssøla



5.b í Argja Skúla




# Cand. cos?



**Á Snyrtiskóla Íslands hava føroyskar gentur og dreingir møguleika at læra til fríðkanarserfrøðing uppá 10 mánaðar. Skúlin er býttur upp í tríggjar lestrarhálvur, og 40 næmingar verða tiknir inn á skúlan um árið**

ÚTBÚGVING
*Ingrid Bjarnastein*

Um tú ert skúlatroytt ella troyttur, hevur tú møguleika at velja eina heldur øðrvísi útbúgving á Snyrtiskóla Íslands. Her er talan um eina fríðkanarserfrøðisliga útbúgving, ella at læra til kosmetilog, sum tað eisini verður kallað.

Skúlin varð stovnaður fyri nærum trimum árum síðani, og hvørt árið verða 40 næmingar tiknir inn. Útbúgvingin er býtt upp í tríggjar lestrarhálvur. Fyrstu lestrarhálvuna verður undirvíst í andlitsviðgerð, aðru verður undirvíst í kropsviðgerð og triðja lestrarhálvan verður nýtt at kunna næmingarnar um hárfjerning.

– Vit hava altíð ein ella tveir flokkar, alt eftir, hvussu nógv teknað seg til skúlan, sigur Hanna Kristin Didriksen, sum er rektari á skúlanum.

– Hesa lestrarhálvuna hava vit 28 gentur, men vit vilja eisini meir enn fegin fáa dreingir at vera við. Hvørt árið taka vit fimm til sjey føroyskar næmingar.

### Skúlaheim

Til skúlan er eitt skúlaheim. Av tí at skúlin er ein privatskúli, so kostar hann 118.000 krónur. Møguleiki er at búgva á skúlaheiminum, sum er nýmótans innrættað, við nýggjum kømrum, stovu, køki, wc/bað og vaskirúmi. Skúlaheimið kostar 3500 krónur um mánaðan, men tá er ikki matur við í prísinum.

– Einastu krøvini vit seta er, at genturnar eru 18 ár ella eldri. Tær skulu verða lidnar við fólkaskúlan, men teimum nýtist onga hægri útbúgving, greiðir Hanna Kristin frá. – Í hesi lestrarhálvuni hava vit gentur, sum eru 18-56 ár.

Skúlin er hvønn gerandidag frá klokkan 9-16.40, og eisini leygardagar frá klokkan 9-12.30. Áðrenn døgurða verður undirvíst í tí bókliga, men næmingarnir fáa praktiska undirvísing aftaná døgurða.

Hanna Kristin Didriksen vil fáa skúlan eitt sindur fram í ljósið, tí hon heldur tað er uppá tíðina, ein fríðkanarstova letur upp í Føroyum. Tí vilja tær fegnar fáa føroyskar gentur til Íslands, soleiðis, at gerast kann klárt fyri eini tílíkari vinnu eisini í Føroyum.

Um nakar hevur hug at fáa meira at vita um skúlan, ber til at leita sær inn á heimasíðuna hjá skúlanum, sum liggur undir www.snyrting.is. Eisini ber til at ringja á telefon 00354 5618776. Tosað verður føroyskt uttan trupulleikar.



# Løgtingsvalið 30. apríl

**Anfinn Kallsberg ætlar sær at útskriva val til Føroya løgting 18. mars 2002. Hin 30. apríl skulu Anfinn og øll hini við valrætti í Føroyum á val fyri at velja landsins kosnu menn og kvinnur. Vit hyggja nærri at komandi løgtingsvalið**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*



*Anfinn Kallsberg ætlar at útskriva val 18. mars og fara á val 30. apríl*

– Eg ætli, at løgtingsval skal vera 30. apíl, og eg fari at útskriva val 18. mars, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

30. apríl eru tað nevniliga fýra ár síðani, at tað seinast var løgtingsval. Tað ferðina var tað Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður, ið skrivaði út val til Føroya Løgting. Lógtingsval skal, sambært løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978, vera fjórða hvørt ár. Tað er løgmaður ella løgtingið, ið skal útskriva løgtingsva. Orsøkin til, at Anfinn Kallsberg fer at útskriva val 18. mars er, at valið skal útskrivast í minsta lagi seks og í mesta lagi átta vikur undan valdegnum. Tá valið verður útskriva 18. mars, so merkja hetta, at tað verður lýst 19. mars, og hetta eru akkurát seks vikur undan 30. apríl, ið sum sagt er síðsta freist at løgtingsval skal vera.

– Týsdagur er eisini vanligur valdagur, sigur Anfinn Kallsberg.

### 27+5

Til Løgtingið skulu veljast 27 valdømisvald og í mesta lagi fimm eykavald. Teir 27 valdømisvaldu verða býttir millum sjey valdømui. Norðoya sýsla hevur 4 umboð, Eysturoyar sýsla 5, Norðstremoy 2, Suðurstreymoy 8, Vága sýsla 2, Sandoyar sýsla 2 og Suðuroyar sýsla hevur 4 limir. Býtt verður í teimum einstøku valdømum á tann hátt, at býtt verður fyrst við 1 og so við 2, og av hesum fæst so úrslitið. Hetta er fyri so vítt rættiliga greitt, og býtið lætt at gera upp.

Løgtingsvallógin tilskilar eisini, at veljast kunnu í mesta lagi fimm eykavaldir. Tað er nevniliga ikki víst, at tað verða valdir fimm eykavaldir, men hetta hevur verið soleiðis síðani galdandi løgtingsvallóg kom í gildi í 1978. Áðrenn hetta vóru 20 valdømisvaldir tingmenn og í mesta lagi 10 eykavaldir tingmenn, soleiðis at tingmannatalið kundi skifta eitt sindur.

Oftani er tað soleiðis, at tað eru smærri flokkarnir, ið gera sær dælt av eykavaldum tingmannasessum. Til komandi løgtingsval eru útlitini hjá teimum smærru flokkunum, t.e. Miðflokkurin og Sjálvsstýrisflokkurin, ikki tey bestu í so máta. Eitt annað, ið er avgerandi tá tosað verður um eykavaldar er, hvussu »kostnaðarmiklir« teir valdømisvaldu eru. Tað er nevniliga eisini soleiðis, at gjørt verður upp, hvussu nógvar tingmenn tann einstaki flokkurin »eigur« at fáa við at samlaða atkvøðutalið verður býtti við talið av valdømisvaldum. Atkvøðutalið hjá hvørjum flokki sær verður síðani býtt við tí áðurnevnda talið, og harvi fæst talið á teimum tingmonnum, ið hvør flokkur sær eigur at hava. Hevur ein flokkur fingu minni í sín part enn hann eigur, t.e. bíligar tingmenn, fær hann tískil ongan eykavaldan tingmann.

Funnið verður síðani, hvussu óumboðaðar atkvøður eru í hvørjum valdømi, og hetta verður so avgerandi fyri, hvør fær sessin sum eykavaldur.

### 9. apríl

Allir valevnalistar skulu vera latnir inn áðrenn 9. apríl, um hesir skulu teljast við. Talið av valevnum á hvørjum lista er treytað av, hvussu nógvir valdømisvaldir tingmenn verða valdir í tí einstaka valdømini.

»Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn trý fleiri enn talið av løgtingsmonnum, tó ongantíð meiri enn tað dupulta, ið veljast skulu í valdøminum.« Soleiðis stendur at lesa í lógini.

Í løtuni er eitt mál í løgtingið um at gera broytingar í løgtingsvallógini, men talan er um smærri broytingar.



*Talið av teimu, ið fara á val 30. apríl fer ógvuliga sannlíkt at seta met, men talið av flokkum, ið koma at sita á løgtingið kann gerast munandi minni enn seinastu árini*